# Snældan – spinnarí síðani 1949

**Spinnaríið Snældan hevur verið til síðani 1949. Spinnaríið hevur ment seg gjøgnum árini, og nú eru sjey fólk í starvi fulla tíð. Abbasonur grundleggjaran eigur nú spinnaríið**

FAMILJUFYRITØKA
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*



*Karl Jóhan Olsen vísir okkum maskinurnar. Hendan er 17 metrar lang.*

*Mynd Jens Kr. Vang*

Tá ið vit koyra eftir landsvegnum við sjóvarmálan á Strondum, er ein smalur grúsvegur sum gongur oman móti einum gomlum gulum húsum. Ikki fyrr enn tú kemur til hurðina sært tú, at hetta er ein handil.

Hóast handilin Snældan ikki sær út av nógvum uttanifrá, so skalt tú ikki lata teg lumpa. Tá ið vit stíga innar, koma vit inn í handilin fyrst. Tað hanga vørur á stativum, og okkurt liggur eisini á hillunum. Nakrar ginur eru latnar í klæðini, og tað sær bara heilt gott út.

Vit verða móttiknir av einari fryntligari ungari damu, sum eitur Magdalena Olsen. Hon vísir okkum víðari til pápa sín, Karl Jóhan Olsen, sum eigur og rekur Snælduna.

## Heilsøla

Spurdur hví handilin liggur so avsíðis, svarar Karl Jóhan, at tað er so stutt síðani, at teir hava opnað handilin. Fyrr var tað bara heilsøla. Tey framleiða alla vøruna á Strondum, sum síðani verður seld í ymsum handlum.

-Her á Strondum konsentrera vit okkum mest um at framleiða. Handilin er ikki so týdningarmikil. Men kanska eg fari at koyra eitt skelti upp, so at tað sæst betri, hvar vit liggja, sigur Karl Jóhan.

Snældan selur til føroyskar handlar. Fyrr seldu tey eisini nógvar skipstroyggjur uttanlands, men nú verða slíkar troyggjur framleiddar nógv bíligari aðrastaðni. Arbeiðslønin er nógv lægri í menningarlondunum, og tað eru serliga tær stóru tekstilverksmiðjurnar, sum flyta framleiðsluna til menningarlond.

Tað gongur væl hjá Snælduni. Karl Jóhan hevur 7 fólk í starvi fulla tíð. Tey nýta føroyska ull, men hon verður blandað við útlendskari ull.

- 40% av allari søluni er tógv. Tað eru nógv, sum keypa tógv frá okkum, tí at tey vilja sjálvi binda sær eina serstaka troyggju. Serliga eru tað ungar gentur, sum fegin vilja hava eina pena troyggju, sum eingin annar eigur líka.

Hini 60% av søluni eru troyggjur, kot, jakkar og annað. Karl Jóhan sniðgevur sjálvur, men onkuntíð gjalda tey einum sniðgeva til at gera eitt serligt modell.

## Blakaðu krovið burtur

Ullin, sum verður innflutt til Snælduna, er úr Falklandsoyggjunum. Har verður serligur dentur lagdur á, at ullin skal hava góða góðsku. Teirra seyðahald er heilt øðrvísi enn okkara. Fyri ikki so nógvum árum síðani, blakaðu tey krovið burtur og seldu ullina. Tey nýttu ikki kjøtið til nakað. Einans ullin hevði týdning fyri tey.

- Hetta ljóðar sera løgið í okkara oyrum, men tey halda tað eisini vera løgið, at vit blaka ullina burtur, sigur Karl Jóhan.

Inni í virkishúsinum hava tey nakrar veldigar maskinur standandi. Hesar virka ullina til. Ein maskina ger mynstrini. Tað er ein bandupptakari settur til maskinuna, og á bandinum eru koturnar fyri mynstrinum innlisnar.

Tá ið ullin er virkað til, og hon hevur fingið tann rætta litin, seymar Magdalena stykkini saman til eitt plagg. Magdalena vísir teimum útsendu frá Sosialinum, hvussu hon seymar eina troyggju. Tað tekur henni sera stutta tíð, og so stendur hon við einari vakrari troyggju í hondini.

## Familjufyritøka

Tað var abbin hjá Karl Jóhan, sum byrjaði spinnaríið í 1949. Tað hevur so gingið í arv gjøgnum árini. Karl Jóhan hevur ikki nakra útbúgving, men hann hevur arbeitt við ull alt lívið.

- Tá ið eg varð ungur, plagdi eg at hjálpa til í spinnaríinum. Eg eri uppvaksin við hesum arbeiðinum, sigur Karl Jóhan.

Øll tey sjey, sum arbeiða á Snælduni eru onkursvegna í familju við Karl Jóhan.

Snældan er vorðin ein ímynd fyri tí serføroyska, og tað eru nógv ferðafólk, sum koma at vitja um summarið. Virksemið koyrir í einari tryggari legu við føstum kundum, og Karl Jóhan er væl nøgdur við handilin hjá sær. Snældan fer helst at verða ein familjufyritøka á Strondum í nógv ár framyvir.



*Magdalena Olsen seymar eina troyggju burturúr ullstykkjunum. Tað tekur ikki langa tíð hjá Magdalenu at gera eina troyggju.*

*Mynd Jens Kr. Vang*